**KLAKSVÍKAR KOMMUNA**
Postboks 2
FO-710 Klaksvík

Undirskrift formansins: ____________

# Klaksvíkar Býráð

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 26.09.2024 kl. 17:30 |
| **Mál nr.:** | 21/01365 Gerðabók |
| **Nevndarlimir:** | Karl H. Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna C. Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen, Tummas Lervig og Annika S. Biskopstø |
| **Varalimir:** | Herfrí J. Sørensen tók sæti fyri Jóhonnu C. Christiansen |
| **Ikki møtt:** | Óli M. Lassen |
| **Onnur:** | Rúni Rasmussen, kommunustjóri |
| **Protokollførari** | Jensa Anthoniussen, fulltrúi |

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 63/24 | 24/00008-8 | Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi, Jóhanna C. Christiansen |
| 64/24 | 24/00926-20 | Fíggjarætlan 2025, Klaksvíkar Býráð |
| 65/24 | 24/00926-17 | Fíggjarætlan Kl. Sløkkiliðs fyri 2025 til góðkenningar í kommunustýrinum |
| 66/24 | 24/01017-1 | Reglugerð um fulltrú til kommunalar bindingar, dagføring sept. 2024 ísv. stjóraskifti (tekniskur stjóri) |
| 67/24 | 24/00578-3 | Nýggjar bátabrúgvar á Borðoyarvík - flyting av játtan |

## 63/24
## 24/00008-8 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi, Jóhanna C. Christiansen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2024 | 63/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Jóhanna C. Christiansen, býráðslimur vald fyri Fólkaflokkin, hevur boðað frá, at hon ikki fær møtt á býráðsfundi 26. sept. 2024. Næstvaldi á listanum fær heldur ikki møtt, og tí er heitt á triðvaldu, Herfrí J. Sørensen um at møta.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 18

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fundarsamsýning til tiltakslimin, um býráðið avger at lata hann taka sæti á fundinum.

**Tilmæli:**
Býráðið verður at taka støðu til áheitanina um innkalling av tiltakslimi fyri Jóhonnu C. Christiansen.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2024:**
Einmælt samtykt at lata Herfrí J. Sørensen taka sæti í býráðnum til fundin.

## 64/24
## 24/00926-20 Fíggjarætlan 2025, Klaksvíkar Býráð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.09.2024 | 62/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2024 | 64/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Sambært kommunustýrislógini skal býráðið samtykkja tann yvirskipaða fíggjarkarmin fyri komandi ár áðrenn 1. oktober.

Tað eru tveir temadagar settir av til fíggjarætlanararbeiðið, har býráðslimir saman við umsiting viðgera rakstur og íløgur:

- Temadagur I verður 25. oktober, har raksturin verður viðgjørdur
- Temadagur II verður 22. november, tá íløgurnar verða gjøgnumgingnar

Fíggjarætlanin verður síðani viðgjørd í fíggjarnevndini 26. november og í býráðnum 28. november.
Talvan niðanfyri vísir uppskot til fíggjarkarm 2025 og gongdina seinastu 4 árini.
Inntøkurnar komandi ár eru settar til 345 mió.kr., og hava tær støði í uppgerðum, sum FMR og Taks sendu út fyrst í september, og at lønirnar á arbeiðsmarknaðinum hækka.

Raksturin er settur til 286 mió.kr, sum er 12,5 mió.kr. hægri enn avsetingin i 2024. Økingin fer til lønarvøkstur og prísvøkstur.
Kommunan skal rinda 2 mió.kr. í stuðli til Húsarhaldsskúla Føroya (HSF) í 2025. Upphæddin er ikki við. Avlopið frá rakstri er 89,6 mió.kr.
Við rentustuðli (7 mió.kr.) og rentugjaldingum (12,4 mió.kr.) er avlopið áðrenn íløgur og avdráttir 70,2 mió.kr.

**KLAKSVÍKAR KOMMUNA**
Postboks 2
FO-710 Klaksvík

Undirskrift formansins: ______________

| | | | | | Roknskapur 2024 | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | Fíggjarætlan | | Roknskapur | | Fíggjarætlan 2025 - uppskot karmar | | |
| Tkr | R 2020 | R 2021 | R 2022 | R 2023 | Uppruna-ætlan | Dagførd ætlan | Meting roknskap 2024 | Munur DFÆ2024 og MR2024 | 1. uppskot Æ2025 | Munur UÆ2024 og UÆ2025 | Munur UÆ2024 UÆ2025 (%) |
| Inntøkur | 295.445 | 293.879 | 315.360 | 344.923 | 352.700 | 352.700 | 361.822 | 9.122 | 375.596 | 22.896 | 6,5 |
| Rakstrarútreiðslur | 226.618 | 240.189 | 254.174 | 272.453 | 273.469 | 287.751 | 294.018 | 6.267 | 285.962 | 12.493 | 4,6 |
| | 68.827 | 53.690 | 61.186 | 72.470 | 79.231 | 64.949 | 67.804 | 2.855 | 89.634 | 10.403 | 13,1 |
| Stuðul rentuútreiðslur bústað | 3.754 | 3.794 | 4.097 | 6.144 | 7.000 | 7.000 | 7.000 | 0 | 7.000 | 0 | 0,0 |
| | 65.073 | 49.895 | 57.089 | 66.326 | 72.231 | 57.949 | 60.804 | 2.855 | 82.634 | 10.403 | 14,4 |
| Rentugjaldingar | 3.065 | 3.538 | 5.330 | 9.233 | 11.400 | 11.400 | 11.450 | 50 | 12.400 | 1.000 | 8,8 |
| **Úrslit áðrenn rentur og avdráttir** | **62.008** | **46.357** | **51.759** | **57.093** | **60.831** | **46.549** | **49.354** | **2.805** | **70.234** | **9.403** | 15,5 |
| Íløgur | 118.929 | 148.771 | 112.438 | 55.632 | 53.517 | 69.600 | 68.000 | | | | |
| **Úrslit áðrenn avdráttir** | **-56.921** | **-102.413** | **-60.679** | **1.461** | **7.314** | **-23.051** | **-18.646** | | **70.234** | **9.403** | 128,6 |
| **Lyklatøl (uttan íløgustuðul):** | **R2020** | **R2021** | **R2022** | **R2023** | **Uppruna-ætlan 2024** | **Dagførd ætlan 2024** | **MR2024** | | **1. uppskot Æ2025** | | |
| **Lutfall rakstur og inntøkur (%)** | 75,0 | 79,7 | 77,7 | 75,5 | 77,5 | 78,5 | 78,2 | | 76,1 | | |
| **Lutfall rakst+rent og inntøkur (%)** | 77,3 | 82,2 | 80,7 | 80,0 | 82,8 | 83,7 | 83,3 | | 81,3 | | |

Rakstur uttan íløgustuðul:

| | R2020 | R2021 | R2022 | R2023 | Uppruna-ætlan 2024 | Dagførd ætlan 2024 | MR2024 | 1. uppskot Æ2025 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstarútreiðslur | 226.618 | 240.189 | 254.174 | 272.453 | 273.469 | 287.751 | 294.018 | 285.962 |
| Herav løgustuðul: | | | | | | | | |
| Varpið | 3.000 | 6.000 | 9.000 | 3.000 | 0 | 3.000 | 3.000 | 0 |
| HSF | 2.047 | | | 8.988 | 0 | 8.000 | 8.000 | 0 |
| | 5.047 | 6.000 | 9.000 | 11.988 | 0 | 11.000 | 11.000 | 0 |
| Rakstur u/løgustuðul | 221.571 | 234.189 | 245.174 | 260.465 | 273.469 | 276.751 | 283.018 | 285.962 |

Býráðið samtykti í februar 2023 at rinda 30 mió.kr. í lánsgjøldum næstu árini. Við 12,4 mió.kr. í rentum, verða avdráttirnir 17,6 mió.kr. og íløgurnar 51,9 mió.kr.

| | |
|---|---|
| Úrslit áðrenn íløgur og avdráttir | 70,2 |
| Avdráttir 30 mió.kr. – 12,4 mió.kr. = | 17,6 |
| Eftir til íløgur | 52,6 |

**Inntøkur**

Sambært uppgerðini eru samlaðu inntøkurnar mettar at verða 375 mió. kr. Persónsskatturin (283 mió. kr.) og felagsskatturin (17,5 mió. kr.) eru metingar.

Persónsskatturin er grundaður á vøksturin januar – august 2024, og at persónsskatturin komandi ár hækkar 4%. Hetta er sami satsur, sum FMR brúkar. Við hesum verða inntøkurnar 283 mió. kr.

Skattur av eftirlønum (61,8 mio. kr. og DIS/FAS 10,1 mió. kr. eru tøl, sum FMR hevur sent út.

Veiði- og tøkugjald eru tey somu sum í 2024. FMR kemur seinni í mánaðinum við meting av postunum.

Tølini verða endurskoðað, tá inntøkurnar fyri september og oktober eru komnar.

| Roknskapur 2024 - framrokning og meting av inntøkunum 2025 | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | RAKSTUR | R2020 | R2021 | R2022 | R2023 | Uppruna-ætlan 2024 | Dagførd ætlan 2024 | Meting R2024 | Broyting | Meting 2025 | Munur 2024/2025 (%) |
| § 20. | Kommunuskattur | 221.132 | 224.021 | 237.618 | 259.110 | 264.753 | 264.753 | 272.057 | 10.882 | 282.939 | 4,0 |
| § 20 | Húsaleiguskattur | 7 | 4 | 10 | 34 | 0 | 0 | 10 | | 10 | 0,0 |
| § 20 | Felagsskattur | 20.867 | 13.555 | 18.373 | 21.807 | 17.500 | 17.500 | 17.500 | | 17.500 | 0,0 |
| § 20 | Skattur av eftirlønarinngjøldum | 41.938 | 45.214 | 48.414 | 52.993 | 55.525 | 55.525 | 58.136 | 3.741 | 61.877 | 6,4 |
| § 20 | Veiði- og tøkugjald | | | | | 3.115 | 3.115 | 3.115 | | 3.115 | 0,0 |
| § 20 | Flyting vegna DIS, FAS og fradr | 11.501 | 11.085 | 10.945 | 10.979 | 11.807 | 11.807 | 11.004 | -849 | 10.155 | -7,7 |
| | Inntøkur | 295.445 | 293.879 | 315.360 | 344.923 | 352.700 | 352.700 | 361.822 | 13.774 | 375.596 | 3,8 |
| | | | | | | | | | | | |
| | **Vøkstur (%)** | **2,4** | **-0,5** | **6,8** | **9,4** | | **2,3** | **4,9** | | **3,8** | |

**Rakstur**
Í uppskotinum er raksturin mettur til 286 mió. kr., sum er 12,5 mió. kr. meira enn avsett í upprunaætlanini 2024. Vøksturin er 4,6%.
Stuðulin til Húsarhaldsskúlan (2 mió. kr.) er ikki við).

| **Upprunaætlan 2024 (rakstur)** | | **273.469.000** |
|---|---|---|
| | | |
| KK lønarvøkstur 135,5 mió. kr. * 4,31% | | 5.840.000 |
| NBH lønarvøkstur (5%) = 4.164 tkr * 86% | | 3.581.000 |
| KK prísvøkstur av stdk 14+15+16 * 3% | | 2.372.000 |
| NBH Prísvøkstur (5%) = 814 tkr * 86% | | 700.000 |
| Annað | | |
| | | 12.493.000 |
| | | |
| **Fíggjarætlan 2025 - rakstur** | | **285.962.000** |

KK eigur 86% av útreiðslunum hjá NBH

FMR og KAF meta, at lønirnar hækka 4,31%.
Lønirnar hjá NBH eru mettar at hækka 5% og av hesum rindar KK 86%.
Undir útreiðslunum hjá KK er prísvøkstur settur til 3% av kontunum 14, 15 og 16, sum gevur 2,4 mió. kr.

NBH hevur sett prísvøksturin til 5% ella 814 tkr. Parturin hjá KK er 86%.

Mett verður, at avsetingarnar til rakstur eru teprar, tá hugt verður eftir gongdini higartil í ár. Flestu játtanir verða brúktar, og dømi eru um rakstrarstøð við meirnýtslum. Um tað ikki verður hildið aftur í útreiðslunum, verður meirnýtslan nakrar mió. kr.

Í 2020 var raksturin 260 mió. kr. (uttan løgustuðl) og seinasta framrokningin fyri 2024 vísir, at raksturin verður 283 mió. kr. (uttan íløgustuðul). Hetta gevur ein miðalvøkstur upp á 6,9%.

Í uppskotinum er lutfallið millum rakstur og inntøkur er 76,1% samanborðið við 75% í 2020.

Leggja vit rentstuðul + rentuútreiðslur afturat rakstrinum, er lutfallið 81,3%, meðan tað í 2020 var 77,3%

Rentustuðul og rentugjaldingar byggja eisini á framrokningar við støði í rentunum 12-09-2024. Bæði skuld og renta eru hækkað nógv seinastu 2 árini, men nú ljóðar, at rentan lækkar. Nevnast kann, at rentan á lánum við skiftandi rentu lækkaði nýliga ca. 0,40 prosentstig.

**Skuld og nettoskuld**
Uppgerðin niðanfyri vísir gongdina í ogn og skuld. Við ársbyrjan var bankaskuldin 358,5 mió. kr. og juni var lán upp á 30 mió. tikið, og í dag er bankaskuldin 392 mió. kr.

| Tkr | R 2017 | R 2017 | R 2018 | R 2019 | R 2020 | R 2021 | R 2022 | R 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bankaskuld | 144.371 | 144.371 | 142.353 | 157.351 | 195.742 | 311.119 | 345.069 | 358.568 |
| Kreditorar v.m. | 25.409 | 25.409 | 24.129 | 33.469 | 47.067 | 54.975 | 52.594 | 41.529 |
| Bruttoskuld | 169.780 | 169.780 | 166.483 | 190.820 | 242.809 | 366.094 | 397.663 | 400.098 |
| | | | | | | | | |
| FGJ, skuldarar v.m. | 71.623 | 71.623 | 48.192 | 44.011 | 51.753 | 42.436 | 43.289 | 43.203 |
| Mett úrslit 2024 | | | | | | | | |
| Innistandandi | 17.949 | 17.949 | 24.636 | 23.746 | 10.675 | 40.922 | 11.012 | 15.091 |
| Áogn íalt | 89.572 | 89.572 | 72.828 | 67.757 | 62.428 | 83.358 | 54.301 | 58.294 |
| | | | | | | | | |
| Nettoskuld | 80.208 | 80.208 | 93.654 | 123.062 | 180.381 | 282.736 | 343.362 | 341.804 |
| | | | | | | | | |
| Ein álíkning 23% | 215.197 | 215.197 | 220.247 | 239.166 | 246.374 | 249.248 | 263.700 | 284.013 |
| . + inntøkur eldraøkið | | | | | | | | 63.972 |
| | | | | | | | | 347.985 |
| Nettoskuld | 80.208 | 80.208 | 93.654 | 123.062 | 180.381 | 282.736 | 343.362 | 341.804 |
| | | | | | | | | |
| **Nettoskuld í mun til álíkning (tkr)** | **134.989** | **134.989** | **126.592** | **116.104** | **65.993** | **-33.488** | **-79.662** | **6.181** |

Við ársenda 2023 var nettoskuldin 6,1 mió. kr. undir eina álíkning, og fyribils meting sigur, at við ársenda 2024 verður kommunan 10,2 mió. kr. undir álíkningina.

| **Nettoskuld mett 31-12-2024 (kr. 1.000)** | |
|---|---|
| Nettoskuld primo sb. roknskap | 341.804 |
| Mett úrslit 2024 | -18.646 |
| | 360.450 |
| Mett persónsskattur 2024 | |
| Persónsskattur umroknað til 23% | 301.557 |
| Inntøkur eldrasøkið (mett) | 69.140 |
| | 370.697 |
| | |
| **Nettoskuld ársenda (undir eina álíkning)** | **10.247** |

Tá er roknað við, at úrslitið í 2024 verður minus 18,6 mió. kr. og ikki 23 mió. kr., sum lagt er upp til í fíggjarætlanini.
Í verandi uppskoti til fíggjarkarm 2025 er úrslitið áðrenn avdráttur og íløgur 70,2 mió. kr. Um tað eydnast at halda seg innan fyri karmin, so verður nettoskuldin ultimo 2025 ca 40 mió. kr. undir álíkningina.

Mett verður, at avsetingin til rakstur (286 mió. kr.) er tepur, og at tað kann gerast trupult at reka kommununa fyri hesa upphædd. Víst verður m.a. á, at stuðulsjáttanin til HSF (2 mió. kr.) er ikki við.

**Gjaldførið**
Gjaldførið er avmarkað og fyri at sleppa undan lántøku, er neyðugt at játtanirnar halda.

Sum kunnugt er raksturin hjá kommununi sera likviditetskrevjandi fyrstu 10 mánaðirnar av árinum, og tí er sannlíkt, at neyðugt verður við lántøku fyrst í komandi ári fyri at tryggja gjaldførið.

Við hesum verður málið um fíggjarkarm 2025 lagt fyri fíggjarnevnd og býráð til støðutakan.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Tað er týdningarmikið, at burðardygd og Heimsmálini verða tikin við í arbeiðið við fíggjarætlanini fyri 2025, og at havt verður í huga langtíðaravleiðingar í bæði rakstrarpartinum og íløgupartinum við atliti at burðardyggari menning av Klaksvíkar kommunu. Neyðugt er at tryggja, at grundleggjandi tænastur til borgarar og onnur í kommununi verða tryggjaðar á haldførari grund, og at íløgur taka støði í tøka fíggjarliga tilfeinginum og í framtíðartørvinum í kommununi.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin § 39, stk. 1

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Avlopið áðrenn íløgur og avdráttir er 69,5 mió. kr.

Við 17,6 mió. kr.í avdrátturm verða 52 mió. kr. til íløgur.
Um mett verður, at játtanin til rakstur skal hækka, minkar avlopið samsvarandi.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 25. september 2024:**
Nevndin mælir til niðanfyri vísta fíggjarkarm fyri fíggjarætlanina 2025 og beinir málið í býráðið.

| | Uppskot Æ2025 (tkr.) |
|---|---|
| Inntøkur | 375.600 |
| Rakstrarútreiðslur | 281.700 |
| Avlop | 93.900 |
| Stuðul til rentuútreiðslur | 7.000 |
| | 86.900 |
| Rentugjaldingar | 12.400 |
| Úrslit áðrenn rentur og avdráttir | 74.500 |
| Íløgur | |
| Úrslit áðrenn avdráttir | 74.500 |

Lutfallið millum rakstur og inntøkur: 75%

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2024:**
Tilmælið frá FíN 25-09-2024 einmælt samtykt.

## 65/24
## 24/00926-17 Fíggjarætlan Klaksvíkar Sløkkiliðs fyri 2025 til góðkenningar í kommunustýrinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 18.09.2024 | K-27/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.09.2024 | 63/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2024 | 65/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Sum kunnugt samstarva kommunurnar í Norðoyggjum um tilbúgving gjøgnum samstarvið "Klaksvíkar Sløkkilið", har samstarvsavtala millum partarnar ásetir fíggingina.

Sambært pkt. 8 "Fíggjarætlan – viðgerð v.m." í samstarvsavtaluni, skulu kommunustýrini góðkenna fíggjarætlanina eftir tilmæli frá tilbúgvingarnevndini. Tilbúgvingarnevndin hevur í t-posti 5. september 2024 heitt á kommunustýrini í samstarvinum um at viðgera og góðkenna fíggjarætlanina fyri Klaksvíkar Sløkkilið fyri 2025, sum samtykt av nevndini 5. september 2024.

Tilbúgvingarnevndin hevur samtykt eina rakstrarjáttanin upp á 2.800.000 kr. (sí viðheftu samtykt).

Fíggjarligi býtislykilin millum kommunurnar í samstarvinum byggir á talið av borgarum í kommununum pr. 31. desember árið fyri, men av tí at íbúgvaratalið pr. 31.12.2024 (= ”árið fyri”) ikki er kent enn, byggir talvan niðanfyri á íbúgvaratalið pr. 30.06.2024*

| Kommuna | Íbúgvar pr. 30-06-2024* | Íbúgvar í % | Rakstrarjáttan pr . kommunu í kr. | Íløgujáttan pr . kommunu í kr. | Játtan pr. kommunu í kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| Fugloyar | 43 | 0,7% | 18.545,90 kr. | 0,00 kr. | 18.545,90 kr. |
| Viðareiðis | 334 | 5,1% | 144.054,22 kr. | 0,00 kr. | 144.054,22 kr. |
| Hvannasunds | 420 | 6,5% | 181.146,03 kr. | 0,00 kr. | 181.146,03 kr. |
| Klaksvíkar | 5545 | 85,4% | 2.391.558,84 kr. | 0,00 kr. | 2.391.558,84 kr. |
| Kunoyar | 150 | 2,3% | 64.695,01 kr. | 0,00 kr. | 64.695,01 kr. |
| Tilsamans | 6492 | 100,0% | 2.800.000,00 kr. | 0,00 kr. | 2.800.000,00 kr. |

Kelda: www.hagstova.fo (12-09-2024)

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Um tikið verður undir við tilmælinum, má rakstrarjáttanin á 2.391.558,84 kr. og íløgujáttanin upp á 0 kr. takast við í kommunalu fíggjarætlanina fyri 2025.

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til at góðkenna fíggjarætlanina fyri Klaksvíkar Sløkkilið fyri 2025, sum samtykt av tilbúgvingarnevndini 5. september 2024.

**Tekniska Nevnd 18. september 2024:**
Tilmælið, dagf. 11-09-2024, verið til kunningar.

**Fíggjarnevndin 24. september 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-09-2024.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2024:**
Tilmælið, dagf. 11-09-2024, einmælt samtykt.

## 66/24
## 24/01017-1 Reglugerð um fulltrú til kommunalar bindingar, dagføring sept. 2024 ísv. stjóraskifti (tekniskur stjóri)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.09.2024 | 65/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2024 | 66/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Í samband við at nýggjur tekniskur stjóri tekur við 1. oktober 2024, skal reglugerðin um fulltrú til kommunalar bindingar dagførast (sí viðhefta uppskot til dagførda reglugerð).

**Burðardygd og heimsmálini:**

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin § 44, stk. 2: "*skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. skulu verða undirskrivað av borgarstjóranum og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess*". Sambært viðmerking til omanfyrinevndu lógargrein "*skal kommunustýrið tilnevna persónliga og við navns nevni medundirskrivaran hjá borgarstjóranum. Starvsheitið er ikki nøktandi*".

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Mælt verður til at taka undir við dagførdu reglugerðini.

**Fíggjarnevndin 25. september 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 19-09-2024.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2024:**
Tilmælið frá FíN 25-09-2024 einmælt samtykt.

## 67/24
## 24/00578-3 Nýggjar bátabrúgvar á Borðoyarvík – flyting av játtan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Havna- og Vinnunevndin | 18.09.2024 | 30/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.09.2024 | 80/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2024 | 67/24 |

**GFrágreiðing um málið:**
Tað er áður samtykt at bátabrúgvarnar í bátahylinum á Borðoyarvík skulu skiftast og hevur fyrisitingin verið í samráð við bátaeigarar, sum hava bát á Borðoyarvík. Tilboð eru innheintaði og er Havnameistarin og Fyrisitingin komin ásamt um hvørjar brúgvarnar skulu verða. Innkomnu tilboðini eru nakað hægri enn sett er av til endamálið.

Grót frá tunlunum norður um fjall, sum skal leggjast út á Norðhavnini hevur í ár eina játtan áljóðandi 8,2 mió. kr. (restupphæddin) og eftir tølum sum eru upplýst so eru tað umleið grót fyri 5 mió. kr. sum er flutt á Norðhavnina í ár og koma tað uml. 10.000 rúmmetrar afturat. Tískil kemur at verða ein restupphædd á hesi játtan.

Um vit flyta 1,5 mió. frá verkætlanini Noðhavnin yvir til bátahýlin á Borðoyarvík, verður játtanin til Borðoyarvík nóg stór til at fáa bátabrúgvarnar í ár.

Játtan til Borðoyarvík er 2,7 mió kr.
Tilboð uppá bátabrúgvar er 3,45 mió kr.

Fáa vit flutt 1,5 mió frá Norðhavnini, klara vit at fáa bátabrúgvarnar lagdar út í ár, soleiðis at samlaða játtanin verður 4,2 mió kr. so er peningur eisini til kranar osfr. Ísv við útleggingina.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
1,5 mió.kr. av óbrúktari játtan verður flutt frá verkætlanini Norðhavnin til verkætlanina bátahylur á Borðoyarvík, báðar liggja undir Kl. Havn.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndin tekur undir við at flyta 1,5 mió.kr. av óbrúktari játtan frá Norðhavnini til verkætlanina bátahylur á Borðoyarvík.

**<u>Havna- og Vinnunevndin 18. september 2024:</u>**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-09-2024.

**<u>Fíggjarnevndin 25. september 2024:</u>**
Nevndin tekur undir við HaVN 18-09-2024.

**<u>Klaksvíkar Býráð 26. september 2024:</u>**
Tilmælið frá FíN 25-09-2024 einmælt samtykt.

Fundurin lokin kl. 18:20